Eftir Rigmor Dam

# Undir einum lítlum træi, liggur... ein bókapakki!

Allarbesta jólagávan er hørð og fýrakantað og keypt í bókabúðini. Sosialurin viðmælir nýggjar føroyskar bókaútgávur í hvørjum blað í jólamánaðinum.

## Lætt & Leskiligt, 3'arin

### Bjóða til borðs við góðari samvitsku




Jóhanna á Tjaldrafløtti og Elisabeth Akursmørk eru aftur í ár úti við einari lekrari kókibók til teirra, sum vilja liva eitt sindur sunnari.

Tær siga, at tær verða ongantíð troyttar av at tosa um mat, uppskriftir og at gera spennandi nýggjar rættir.

– Hesa ferð hava vit latið hugin reika eitt sindur longri bæði til meir eksotiskar uppskriftir og øðrvísi mátar at bjóða til borðs.

Hví ikki bjóða í føðingardag við einum brunch ella eini buffet, har gestirnir kunnu velja millum alskyns smærri rættir so sum, brunchpannukøkur við nøtum í siropi, sushi, grønmetismuffins, laksamousse, høsnasalat við jarðberum og eina spennandi nøtusteik við rabarbuchuteny?

Ein heitan summardag er sjálvandi upplagt at bjóða vinfólkunum við út í havan, har tit njóta sólina og smakkin av ymsum tapas sum dadlum í baconsveipi, hvítleyksstoktum tikararækjum, grissini við pesto og saltaðum mandlum við einum glasi av svalligum hvítvíni afturvið.

Tá so tjúkku kavaflykrurnar balla kvøldini inn, letur tú hugnan og hitan breiða seg í køkinum við eini heitari fiskasúpan ella kanska eini øðrvísi kjøtsúpan við góðum focacciabreyði afturvið.

Sum nakað nýtt hava vit nú eisini ymisk hugskot til morgunmat og millummáltíðir. Royn til dømis okkara havragreyt við peru og súrepli, músli, smoothies, heimagjørda súltutoy, lekru bollar og góðu breyð av ymsum slagi.=20 Breyðini og bollarnir rigga eisini væl, um tú vilt gera matpakkan sunnari og meir spennandi.

Eins og í hinum bókunum fylgja uppskriftirnar kosttilráðingunum, og tær hóska eisini væl til tey, sum hava diabetes, hjartasjúkur, æðrakálking ella skulu ansa eftir vektini.

– Tí fyrst og fremst ynskja vit aftur hesa ferð at geva tær spennandi og lættar uppskriftir til rættir, tú kanst eta við góðari samvitsku og borðreiða við einum smíli.

## Tórshavn - býur og býarbørn

### Trúfasti Birgar við havnarbók




Aftur í ár liggur nýggj bókaútgáva eftir Birgar Johannessen undir jólatrøunum.

Bókin er um havnarfólkini, sum vórðu født árini 1901 til og við 1905. Bókin er 240 síður við hópin av myndum og ymiskum yvirlitum. Í hesum tíðarskeiði var millum annað fyrsta fimleikafelagi í landinum stovnað, fyrsta hornorkestur, umframt Havnar Bóltfelag, Losjan og fyrsti føroyski politistur verður settur í starv.

Í bókini stendur millum annað, hvat kommunan kostaði at reka í 1902-1903, eins og dagførdur skipalisti er í bókini. Perman á bókini er prýdd við einum málningi, sum Kristin í Geil málaði umleið 1910.

– Bókin er bygd upp sum eitt uppslagsverk, ið hevur stóran týdning fyri Havnina, sum helst er einasti býur í heiminum, sum kann vísa á lívsskeiðið hjá hvørjum einstakum borgara, sigur Birgar Johannesen.




Børnini gleða seg ....

## Mín Jólabók 2010

### Ein øðrvísi jólakalendari

Fleiri foreldur hava droppað vanliga pakkakalendaran og hava ístaðin ognað sær jólabókina. Hóast børnini ikki fáa pakkar, fáa tey nakað, sum er nógvar ferðir virðismiklari – serliga í desembur - eina hugnaliga, friðarliga løtu hvønn dag saman við mammu ella babba, ommu ella abba.

Mín jólabók kom út í nýggjum hami í 2003. Størsta broytingin var, at bókin varð skipað sum ein jólakalendari. Tvs. at ein nýggj søga ella ítrivsuppgáva er til hvønn dagin. Harumframt varð stórur dentur lagdur á eitt nýtt flott layout umframt vakrar myndir, sum ung evnarík listafólk hava gjørt.

Umframt ymiskar søgur og ítriv eru tekningarnar hjá Janusi á Húsagarði, har børnini kunnu leita eftir persónum og lutum, ein afturvendandi táttur í Míni jólabók.

Turið Kjølbro og Beinta Johannesen hava ritstjórnað.